DAGSINS MEINING

Ábyrgd fyri búskapinum

Tað er fallið mongum fyri bróstið, at teir flokkar, sum nú mynda landsstýri, hava boðað frá, at teir ætla at fremja tiltøk, sum skulu bøta um hjá teimum trongdu þørtunum av vinnulívinum. Hetta verður lagt út sum, at nú verður vent aftur til tann mekaniska studningsbúskap, sum vit hava ringar royndir av frá áttatiárunum.

Teir flokkar, sum endaðu í andstøðu, krevja treytaleyst, at eingin almenn uppílegging kemur fyri. Teir vilja altso við øðrum orðum, at marknaðurin fullkomuliga skal stýra búskapi og vinnulívi. Hetta er ein erlig støða, og hetta hevur verið roynt í fleiri londum tey seinastu 120 árini. Royndirnar við reinum markanðarbúskapi hava verið einvíst vánaligar.

Hvør 8. floksnæmingur (við allari virðing annars fyri teimum) kenna John Maynard Keynes. Tá heimsbúskapurin skramblaði saman í 1929 m. a. orsakað av reindyrkaðum marknaðarbúskapi í USA, kom Keynes fram við sínum vælkendu áskoðanum um blandingsbúskap. Tað, sum Keynes royndi at fáa politikkarar at skilja, var, at hóast ein í princippinum er fyri marknaðarbúskapi, so koma støður og viðurskifti, sum gera, at statsvaldið noyðist at taka ábyrgd av búskapinum. Tá marknaðarkreftirnar fara í sjálvsveiggj ella sýna ótálmað ábyrgarloysi, ella tá náttúruvanlukkur órógva javnaðvágina í marknarbúskapinum, tá má og skal tað almenna inn sum regulerandi og mennandi táttur.

Alt hetta er hent hjá okkum, og búskapurin, sum sambært fráfarna fíggjarmálaráðharra var grundleggjandi sunnur, er álvarsliga sjúkur. Hetta kann einhvør vissa seg um við at lýta at arbeiðsloysistølunum. 700 fólk eru nú arbeiðsleys, og tølini ganga tíverri skjótt tann skeiva vegin. Her má nakað gerast! At sita hendur í favn, meðan landsmenn í hundraðtali aftur skulu noyðast frá húsi og heimi, er ábyrgarleyst. Tað er her ein skilnaðurin gongur millum landsstýrið og andstøðu. Andstøðan hevur valt tað gomlu liberalistisku uppskriftina hjá Reagan og Tatcher at lata alt, sum ikki kann standa falla, og so rokna tey við, at restin lekir seg av sær sjálvum ella siga sum maðurin á sinni: »Det grejer sig i sjøen!« Men soleiðis er ikki við nútímans búskapi ella fyri alt tað við ILA - tað kemur ikki í rættlag av sjær sjálvum. Tað almenna má taka ábyrgd og leggja karmarnar soleiðis til rættis, at tær sjúku vinnurnar koma fyri seg aftur sum skjótast, so vit ikki aftur enda í arbeiðs- og vinnuloysi. Alt annað er ábyrgarloysi.

Sosialurin

VIÐMERKINGAR

IRF

Eyðun Ellingsgaard

Nú er væl spart hjá IRF, nú ruskmenninir í Vágum eru farnir úr starvi, og fýra bygdir ikki eru slopnar av við ruskið í tvær vikur.

Tað vóru fýra IRF-bilar í senn í Vágum hendan dagin, og allir fóru næstan tómir avstað aftur. Koma teir vestur mánadagin 9. februar, skulu teir taka umleið 1.650 posar, sum viga frá 15 kg til 35 kg. hvør. Bilurin lastar 3,7 tons, so hann verður nakað tungur hendan dagin. Okkurt hjá politinum at hugsa um. Tá stjórin í IRF sigur, at posarnir viga 10 kg í meðal, man tað vera posin undir vaskinum, hann hugsar um.

Eg havi spurt hjá kommununum, hví tær ikki hava mótmælt. Men tær vistu av ongum, fyrr enn tað stóð í bleðunum, at økið er umlagt. Nevndarlimurin hjá Felagskommununi í IRF hevur ikki kunnað tær um nakað.

Nú eru hesi arbeiðsplássini farin av oynni. Annar av teimum, sum hava koyrt rusk í Vágum, er uppsagdur, og hin kundi ikki góðtaka at taka rusk úr Gásadali til Tjørnuvíkar, Oyrar og Funnings. Teir hildu, at tað var best, at Vágar var eitt øki fyri seg, tí teir høvdu nokk at gera Koyrdu í fjør 60.000 km. Teir, sum koyrdu í Eysturoy og Streymoy, koyrdu umleið 50.000 km.

Vónandi broytir IRF støðu, annars má Felagskommunan seta tiltøk í verk.

P.S.
Kanska koma fimm bilar vestur mánadagin + trígir mans í hvørjum bili, fyri at teir ikki skulu verða ov tungir. Løgreglan má kanna bilarnar, áðrenn teir fara avstað aftur.

Adressubroyting

Niels Kári Nielsen

Eg vil takka Jógvan Jacobsen fyri svarið upp á skriv mítt - um Jógvan dugir at síggja nakað briksl móti sær í skrivi mínum, so hevur hann misskilt meg.

Tað, sum eg vildi, var at vísa á, at hóast nakrir flokkar, sum arbeiða meira ella minni fyri størri sjálvstýri, fáa 54,5% av atkvøðunum á einum vali, merkir tað ikki, at 54,5% av fólkinum høvdu atkvøtt fyri fullveldi á eini fólkaatkvøðu.

Annars haldi eg, at tað als ikki kann góðtakast, um úrslitið av eini fólkaatkvøðu bert hevði verið nøkur fá prosentir yvir 50%; eitt minstakrav vildi verið 75% ella meira til eitt so týdningarmikið mál sum framtíð føroyinga.

Eisini vildi eg vísa á, at fullveldissamgongan hevði allar møguleikar at fáa staðfest, um fólkið tók undir við fullveldistilgongdini. Men teir valdu, í evstu løtu, at nokta fólkinum møguleikan at siga sína hugsan. Orsøkin var, at teir vóru bangnir fyri, at meiriluti fór at vera ímóti.

Sum eg dugi at síggja, er Jógvan Jacobsen ikki so ósamdur í hesum, av tí at hann eisini harmast um, at fólkaatkvøðan í 2001 varð avlýst.

At útsagnir og meiningar hjá Unga Tjóðveldinum og Tjóðveldisflokkinum og formenn tess als ikki skulu samanberast á nakran hátt, má eg viðganga, at eg ikki visti av.

Annars hevði eg ikki orðað skriv mítt, sum eg gjørdi. Tað undrar meg ikki sørt, at Jógvan Jacobsen so eyðsýnt vil markera munin millum Tjóðveldisflokkin og Ungmannafelagið.

Vanliga er eitt politiskt ungmannafelag sprottið úr flokkinum, mest fyri at fáa ungfólk áhugaði í politiskum arbeiði, og eru ungmannafeløgini eisini við at mynda politikkin hjá flokkinum; hví hetta ikki er galdandi fyri Tjóðveldi, skal eg ikki gera meg klókan uppá.

Men eg skal leggja mær í geyma, at adressurnar er ymiskar í Tjóðveldisleguni!

Hvat hendi í 1946 hava nógvir vísir menn roynt at gera seg klókar uppá, serliga tjóðveldismenn.

Eg vil heldur hyggja framefttir enn aftureftir - fortíðin er farin, men framtíðina kunnu vit vera við til at skapa.

Helst allir føroyingar saman, Sambandsmenn og Tjóðveldismenn.

Norðurlandaráðið

Finnbogi Ísakson

Í tíðindunum frættist, at valið av tveimum limum í Norðurlandaráðið er útsett í nakrar dagar, tí Tjóðveldisflokkurin vil hava annað umboðið, hóast samgongan saman við Sjálvstýrisflokkinum er so talsterk, at hon eigur báðar.

Mær rennur til hugs, at á valinum í 1974 gjørdist tingmannatalið 26 tilsamans. Ein samgonga varð skipað millum Javnaðarflokkin, Tjóðveldisflokkin og Fólkaflokkin við 18 tingmonnum aftan fyri sig.

Samgongan var sostatt nóg sterk til at fáa bæði umboðini, tí helvtin av 18 gevur 9 tingmenn, meðan andstøðan bert hevði 8.

Eg eri fullvísur í - men havi ikki kannað tað gjølla -, at samgongan læt andstøðuna fáa annað umboðið. Tað varð gjørt, tí andin í allari skipanini við Norðurlandaráðnum er, at tingini í londunum skula vera so breitt umboðað sum gjørligt. Tað er nakað at hugsa um hjá einari breiðari samgongu.

Tað ber ikki til hjá samgonguni at siga, at andstøðan fær annað umboðið, tí Kári P. Højgaard fær sessin. Tá valt verður, er hann ikki í andstøðu, men samgongu.

Sosialurin

Sosialurin
Stovnaður: 1927
Ábyrgdarbladstjóri: Jan Müller
jan@sosialurin.fo
Bladstjóri: Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
Figgjarleiðari: Jákup Mørk
jakup@sosialurin.fo

Marknaðardeild: lysing@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad
finnbjorg@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo

Bladfólk:
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Dagfinn Olsen dagfinn@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Páll Holm Johannesen pall@sosialurin.fo
Heini í Skorini heini@sosialurin.fo

Ítróttur:
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

Myndamenn:
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

Sosialurin í Norðoyggjum:
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
Sosialurin í Suðuroy:
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo
Sosialurin í Eysturoy:
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 449520
tel. 228909
e-post: vilmund@sosialurin.fo
Sosialurin í Vágum:
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

Uppseting/prent:
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstaðin
Útgevari:
Sp/f Sosialurin
Avgreiðsla:
Mán.-fri. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 341800, Fax 341801
Postadressa:
Postboks 76, 110 Tórshavn
E-mail:
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað
mánadag-friggjadag klokkan 14[00]

Lýsingar

Freistir:	Tekstlýsingar	Størri lýsingar	Lýsingartorgið	Heilsanir
Týsdagsblaðið	Mán.kl. 10	Frí. kl. 15	Frí. kl. 12	Frí. kl. 12
Mikudagsblaðið	Týs. kl. 10	Mán. kl. 15	Mán. kl. 12	Mán. kl. 12
Hósdagsblaðið	Mik. kl. 10	Týs. kl. 15	Týs. kl. 12	Týs. kl. 12
Fríggjadagsblaðið	Hós. kl. 10	Mik. kl. 15	Mik. kl. 12	Mik. kl. 12
Leygardagsblaðið	Frí. kl. 10	Hós. kl. 15	Hós. kl. 12	Hós. kl. 12

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

Stødd:
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

Innsent tilfar
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.

Nýtt landsstýri

Heri Mohr

Verbalisman, sum tey farnu 6 árini hevur eyðkent føroyskan politik - eyðkent kanska serstakliga av broddinum á tí hálvrunna loysingarfallinum -, hevur tíðum verið á so lágum støði, at vanligt vit og skil ikki funnu stev í tí ovurkáta og villa dansinum. Rakstrarrópini um tey mongu, sum ikki eru (vóru) rættir føroyingar, hoyrdust hvøll út um landamørk, og dansurin varð tí ikki troddur so lættlig við lív og sál sum eitt nú, táið sumbingar kvøða.

Tað, sum mest av øllum hevur voldað split og klandur millum fólk, eru tær ósonnu frágreiðingarnar, sum ávísir politikkarar og teirra eltibløðrur áhaldandi hava potað í okkum føroyingar. Summi av hesum fólkum eru so alvitug og háfloygd, at í eini kapping hevði fantasiríki skrøggarin, barónurin von Münchhausen, verið við undirlutan. Um vit leita í utopisavnum, har ein Münchhausen sum sagt lítið hevði formátt sær, síggja vit, at loysingarmenn krevja tær árligu 616 milliónirnar, sum landskassin fær úr ríkiskassanum til rakstur av heilsuverkinum og almannaverkinum, tveittar á bláman á sama hátt, sum fram varð farið, táið 366 milliónir vórðu burturbeindar tann 1. januar 2002.

Hesir pengarnir, blokkurin úr ríkiskassanum, stoðið undir vælferðini í Føroyum í 30 - 40 ár, var orsøkin til, at tað maðketna føroyska samfelagið fór á heysin tann minniliga heystdagin í 1992, sum syndraði landskassan, peningakervið og hús og heim, tá ið skriðubakkin leyp.

Siga loysingarfólk. Og tí skal blokkurin á bláman !

Altso: tað føroyska samfelagið fór rabundus fyri 11 árum síðani, takkað verið teimum ungu, sum vóru í útbúgving, teimum sjúku, teimum avlamnu, teimum gomlu. Hesi lótu seg við "danskari olmussu" og "tátu" vagga í dreymadjúpan Tornurósusvøvn. Men úr hesari transustøðu skal nú ein forloysing uppstanda, og í dreymi skulu rísa 18 fjallatindar við eini brosandi Atlantis prestinnu í paradísiskum vakurleika sum eitt Shangri-la í Himalaya, har eingin sjúka, einki elli, og eingin deyði valdar. "Hitt lovaða serføroyska Elysionið er uppstaðið, halleluja", ljóðar recitativið í gleðisrúsi, meðan 1. og 2. bassur í kórinum murra "Ongan blokk, halleluja".

Við støði í einum samgonguskjali gjørdi landsstýrismaðurin við fíggjarmálum av at fastfrysta restblokkin upp á 616 milliónir frá 1. januar 2002 at rokna. Fastfrysta blokkin! - Við hvørjari lógarheimild ella við hvørjum mandati kundi landsstýrismaðurin taka avgerð, sum gav landskassanum millióna tap ríkiskassanum til fyrimunar? Kanska kundu Føroya fólk fingið svar upp á hendan spurningin? Í hesum føri var ikki talan um yvirtøku av ávísum málsøkjum !

Í Dimmalætting 29. januar skrivar sami landsstýrismaður, emeritus, m.a. (…)"Avdráttur av lánum skulu ikki dragast frá, tá talan er um úrslit landskassans, gjørdu vit tað, so skuldu vit eisini fört lánini til inntøku. Um vit bara draga avdráttir frá á rakstrinum, hvussu hevði so úrslitið sæð út í 2003. Tá guldu vit eyka avdrátt uppá 500 mió. kr."

Av sonnum aforistisk gullkorn. Kundi eins væl verið sagt í skemtileikinum Ebberød Bank fyri 80 árum síðani.

Nýggja landsstýrið kemur ikki til búgvið borð ella skorin klæði, men tað eigur at síggja til at fáa dialogin millum Føroyar og Danmark í eina fólkaliga og siðiliga legu, sum sømir seg mentaðum fólki.

(….) -Av stáli er rúnakelvi, í angist og kulda og skelvi.

Lat tað ikki henda aftur !

Og spurningurin um at fáa tann fastfrysta blokkin dagførdan herundir Psykiatrisku deild á Landssjúkrahúsinum og Ríkissjúkrahúsið, sum eru 100% ríkiskassaøki, eigur at verða tikin upp, eins og blokkurin fingin úr djúpfrystaranum skjótast gjør-0ligt. Hetta er landsstýrisins einfalda skylda fyrst og fremst móti gomlum, sjúkum og avlamnum í Føroyum.

Fyri at sleppa undan framhaldandi ruðuleika við misskiljingum og ósannindum er tað neyðugt at halda skil á, hvat blokkurin skal brúkast til, tað vil siga, eina sundurliðing sum vísir, hvussu blokkurin er skrúvaður saman. Hetta eigur skilliga at framganga av løgtingsins fíggjarlóg.

Hurlivasið

Lag: Gamla Dimma

Her alt landið er á gosi,
hurlivas í tingi er.
Saman høvdu tey mangt nosið,
hvørjir flokkar stýrdu her.

Niðurlag:
Okur eru pensjónistar,
nøkur hava stóra neyð.
Skjóti ikki journalistar,
stóra vitan hava tey.

Fýra flokka meirilutin,
illa saman eintust meir.
Jú, teir vóru eins og karðar:
Hvørja nátt hálsfevndust teir.

Men nú mátti endin bresta,
alt ov nógv stóð honum á,
nú er slonkin pengakassi,
hvar skal krónan koma frá.

Ja, nú skulu tey øll pyntast,
tey í sjónvarp skulu her.
Lova gull og grønar skógir,
journalistur við teimum er.

Nú, tey runt um landið reika,
bygd úr bygd og bý úr bý.
Ógvusliga nógv ið leika,
tey nú vilja tingið í.

Tosa nógv um pensjónistar,
hjálp nú skulu "fá" úr neyð.
Tey gomlu skulu kross teim geva,
fót í reyv so fáa tey.

Men flokkur ein, hann orð man halda,
fyri okkum stríddust væl.
Hægri pensjónir, fer at gjalda
C tí kross mín fáa skal.

T.L.

Hvat nú, Kristin Vestergaard

Schandorff Vang

Var valið fiasko ella ikki? Sambandsflokkurin vann valið við flestu atkvøðum, men fall við býtinum av tingmonnum. Hetta hevur øst mangan veljara kring landið, og tað skilji eg væl. Kristin Vestergaard hevur tann 5. februar grein á portalinum hjá Dimmalætting, í greinini er nógv gott at finna, men fari eg at gera nakrar viðmerkingar.

Tú leggur eftir skipanini av flokkinum og skrivstovuni, sum eg havi varað av síðan beint undan fólkatingavalinum 2001. Hvat skrivstovuni viðvíkur, er bygt upp eitt gott net og eitt gott samstarv millum valfeløgini, valevni og limir kring landið. Effektivitetturin og tænastustøðið er høgt. Valfeløgini seta størri krøv í dag, enn tey hava gjørt áður og eg trúgvi ikki tú finnur nakað valfelag, sum kann siga, at tey ikki hava fingið nøktandi tænastu higani. Tað sama er galdandi fyri limir og veljarar floksins, saman við øðrum, sum venda sær higar í einum hvørjum ørindi.

Um Kristin Vestergaard meinar nakað annað, fari eg at spyrja hann, hvar hann hevur hetta frá? Tí hann hevur ikki eina einastu ferð ringt, skrivað ella vitjað skrivstovuna. Hevði hann sett spurningar ella ynskir fram á skrivstovuni, hevði eisini hann fingið somu góðu tænastu, sum øll onnur. Skrivstovan er opin dagliga og hevur annars umstilling, so til ber at fá samband so at siga alt døgnið.

Hvat viðvíkur ávirkan á politik floksins, er vegurin at gerast limur í valfelagnum har man býr, møta til limafundirnar, royna at fáa ávirkan í nevndini, sum síðan fer á landsnevndarfundir og landsfundin fyri at gera sína ávirkan. Ein og hvør kann eisini møta á heystfundi og landsfundi, og koma við sjónarmiðum.

So míni boð til Kristin Vestergaard eru (um hann vil hava ávirkan) - tekna teg sum lim í flokkinum.

Nýggj samgonga

Jákup Sverri Kass

Hvør ið hevur skylduna av at val varð útskrivað, kunnu vit keglast um í allar ævir. Onkur setur ultimatum, og onkur vildi ikki lata við seg koma. Men veruleikin er sera greiður - vit hava fingið eitt "systemskifti" í føroyskum politikki. Vit hava fingið eina samgongu ímillum tríggjar av teimum stóru flokkunum, og spennandi verður at síggja, hvussu tað fer at ganga. Vónandi er útbrotið hjá Hans Paula Strøm og manglandi samskifti í samgonguni bert ein byrjunartruputeikki.

Í prinsippinum vildi eg gjarna sæð tí gomlu samgonguna hildið áfram, men hyggur ein at teim mongu áhaldandi persónligu innanhýsis stríðunum, sum vóru, so er spurningurin, um Føroya fólk ikki hevur brúk fyri eitt sindur av friði á politiska økinum. Føroya fólk hevur helst brúk fyri at gerandispolitikkur aftur verður førdur, og at sjálvsstýrismálið (sum nú liggur í einari fastari legu) fær tíð at búnast.

Politikkur er annað enn áhaldandi kegl um loysing ella samband. Sjálvsstýrispurningurin skal loysast her á landið, áðrenn øll onnur skulu blandast uppí. Sjálvandi skulu vit arbeiða fram ímóti einum føroyskum sjálvstýri, men pláss má eisini verða fyri øðrum á politisku dagsskránni.

Spennandi verður at síggja, um andstøðuflokkarnir eru búnir at føra ein konstruktivan og mennandi andstøðupolitikk, ella um tað verður tað gamla, at andstøðan skal atkvøða ímóti samgonguni, við teirri grundgeving: "Tað hevur man altíð gjørt". Eg vóni veruliga, at føroyskur politikkur er komin longri enn tað.

Vónandi megna anstøðuflokkarnir at skifta plátuna frá konfrontatiónsleiðini, til eina nýggja konstruktiva leið. Eina leið, sum kann merkja, at samgonga og anstøða kann semjast um at standa saman um mál, sum hava týdning fyri menningina av øllum landinum. Vit hava brúk fyri langtíðar ætlanum. Tað ber ikki til, at vit fjórða hvørt ár skifta leið, tí at onkur annar kemur til valdið.

Uttanlands kenna vit langtíðar ætlanir og langtíðar semjur - vónandi letur bæði andstøða og samgonga við seg koma, soleiðis at vit kunnu leggja eina kós, sum røkkur longur enn fýra ár. Tað skylda landsins kosnu umboð veljarunum.

Við sjálvstýriskvøðu.